UTTAN ÚR HEIMI

# Bretska fólkaatkvøðan verður kanska útsett

**Velja fransmenn at vraka ES-grundlógina, kann tað fáa Tony Blair at útseta fólkaatkvøðuna í Bretlandi**

ES-GRUNDLÓGIN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Síðani valstríðið í Bretlandi byrjaði, hevur Tony Blair, forsætisráðharri, gjørt sítt ítarsta fyri at halda spurninginum um ES-grundlógina burturi frá valstríðnum. Hann hevur lovað bretum, at teir skulu sleppa at taka støðu til grundlógina næsta ár, og tí heldur hann onga orsøk vera til at tosa um hana nú.

Men tann óvæntaða harða mótstøðan, sum grundlógin fær í Fraklandi, kann geva Blair trupulleikar, heldur blaðið The Guardian. Tær seinastu meiningakanningarnar sunnan fyri Ermasund hava víst, at fransmenn ætla sær at vraka grundlógina á fólkaatkvøðuni 29. mai, og hendir tað, kann franska úrslitið noyða Blair at útseta fólkaatkvøðuna í Bretlandi. Tað hava keldur í stjórnini eisini váttað, skrivar The Guardian.

Jack Straw, uttanríkisráðharri, segði við ITV-sjónvarpið sunnudagin, at eitt bretskt nei til grundlógina er ein bretskur trupulleiki, meðan eitt franskt nei er evropeiskur trupulleiki.

Tann konservativi andstøðuflokkurin leggur stjórnina undir at tosa við tveimum tungum, tá tað snýr seg um ES-grund-lógina. Teir konservativu hava gjørt greitt, at flokkurin tekur ikki undir við grundlógini, og teir hava boðað frá, at teir ætla sær at endurskoða bretsku treytirnar fyri ES-limaskapinum, fáa teir stjórnarvaldið. The Guardian væntar, at nú verður ES-grundlógin kortini drigin upp í valstríðið.

# Svartur roykur



*Tann fyrsta dagin kom einki burtur úr pávavalinum í Rom, og tí var roykurinm, sum kom upp úr skortsteininum á Vatikaninum, svartur. Tey serkønu vænta, at tað fer at taka minst tríggjar dagar, áðrenn eftirmaðurin hjá Jóhannesi Páll páva verður funnin*

*Mynd: Reuters*

# Hon vil ikki taka við

**Margot Wallstrøm ætlar sær ikki at taka við, tá Gøran Persson leggur frá sær sum formaður í svenska javnaðarflokkinum**

SVØRÍKI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Svenski javnaðarflokkurin hevur brúk fyri onkrum, sum kann fáa teir rýmdu veljararnar at venda aftur, og nógvir sviar halda, at ES-kommiserurin Margot Wallstrøm er tann, sum kann loysa ta uppgávuna. Hon er fyrrverandi mentamála- og almannamálaráðharri og er yvirhøvur væl umtókt ímillum sviar.

Men Margot Wallstrøm hevur ongan hug at taka við eftir Gøran Persson.

– Eg ætli mær at fullføra ta uppgávuna, sum stjórnin hevur givið mær. Tað er týdningarmikið fyri Evropa og fyri Svøríki og svenska javnaðarflokkin, segði hon við Aftonbladet í gjár.

Margot Wallstrøm kom í Ríkisdagin í sjeytiárunum um somu tíð sum Mona Salin og Anna Lindh, og líka síðani hava tær verið umrøddar sum komandi formenn í javnaðarflokkinum. Men so er ikki longur. Mona Salin hevur spilt sínar møguleikar við fíggjarligum óskili, Anna Lindh er deyð, og nú sigur Margot Wallstrøm nei takk.

Onnur, sum kunnu koma upp á tal, eru Per Nuder, fíggjarmálaráðharri, Thomas Bodstrøm, løgmálaráðharri og Ulrica Messing, samferðslumálaráðharri, men eingin teirra hevur tað flogið, sum Margot Wallstrøm hevur, skrivar Aftonbladet.

## Óttast Røkke

Í norska ráfiskakeyparafelagnum eru tey ikki so fegin um, at felagið Aker Seafoods hjá Kjell Inge Røkke ætlar at keypa tvær fiskivinnufyritøkur og fleiri fiskiloyvi í Norðurnoregi.

Trygve Myrvang, stjóri í ráfiskakeyparafelagnum, sigur við Sunnmørsposten, at tað er óheppið, at eitt felag fær so nógv fiskirættindi. Hann væntar, at Aker Seafoods var ov stóran leiklut í norðurnorsku fiskivinnuni, og at tað fer at skerja kappingina. Trygve Myrvang er samdur við formanninum í norska trolarafelagnum, Eivind Volstad, sum heldur, at Aker Seafood fær næstan einkarrætt til fiskivinnuna í Norðurnoregi, verður ætlanin veruleiki.

Men hesum er Svend Ludvigsen, fiskimálaráðharri, ikki samdur við teimum í. Hann vísir á, at fær Aker eafoods loyvi at fullføra ætlanina, fær felagið níggju prosent av toskakvotunum. Er tað einkarrættur, so eru tað fleiri fyritøkur, sum hava einkarrætt í Noregi, sigur ráðharrin.

## Ætlar at játta seg sekan

Zacarias Moussaoui, sum er tann einasti í USA, sum er ákærdur fyri at hava verið við til at skipa fyri atsóknini at World Trade Center og Pentagon tann 11. september í 2001, fer at játta seg sekan.

Sambært blaðnum Washington Post hevur Zacarias Moussaoui kunnað amerikonsku stjórnina um, at hann ætlar at játta seg sekan í ákæruni. Enn er ikki avgjørt, nær málið kemur fyri rættin, men verður tað staðfest, at hann hevur sálarligar trupulleikar, kann málið koma fyri rættin longu í hesi vikuni.

Zacarias Moussaoui er franskur ríkisborgari, men hann er ættaður úr Marokko. Hann bleiv tikin í 2002. Tá játtaði hann seg sekan í at hava verið uppi í atsóknini árið fyri, men seinni tók hann játtanina aftur.

## Lenin heldur 100 ár afturat

Líkið av gamla sovjetska leiðaranum Lenin er so væl varðveitt, at tað kann halda minst 100 ár afturat.

Higartil hevur líkið av Lenin hildið í 80 ár. Seinastu tíðina hava serfrøðingar kannað tað balsameraða líkið. Tað bleiv eisini gjørt í fjør, og tá fekk Lenin nýggj klæðir, men tað hevur hann ikki fingið hesaferð. Jurij Denisov-Nikolskij, sum hevur staðið fyri arbeiðinum, sigur við russiskar fjølmiðlar, at líkið er í so góðum standi, at tað kann halda minst 100 ár afturat, verður tað hildið við líka.

Lenin doyði í 1924, og eftir boðum frá KGB-stovnaranum Feliks Dzjersjinskij bleiv líkið balsamerað og lagt í eina glaskistu, so russar skuldu fáa høvi at minnast mannin, sum grundlegði Sovjetsamveldið. Tað kunnu teir framvegis gera tríggjar tímar um dagin.

## Sleppa ikki til USA

Amerikonsku myndugleikarnir hava ein lista við nøvnum á fólki, sum ikki sleppa at flúgva til USA, og nú standa 31.000 nøvn á listanum. Teir seinastu seks mánaðarnar eru 12.000 nýggj nøvn komin á listan, men myndugleikarnir siga, at listin er framvegis ikki fullkomin.

Tann sokallaði "No fly"-listin hevur fleiri ferðir fingið nógva umrøðu. Einaferð kom fram, at senatorurin Edward Kennedy stóð á listanum, og seinni frættist, at enski fólkasangarin Cat Stevens eisini stóð har.

Fleiri evropeisk flogfeløg hava havt ilt við at góðtaka tann amerikanska listan, men herfyri noyddist tað niðurlendska KLM at sanna, hvat tað kann bera í sær. Júst sum eitt flogfar hjá felagnum var komið til Kanada, fekk tað boð frá amerikonsku myndugleikunum um at venda aftur til Amsterdam, tí tveir brøður úr Saudi-arabia vóru ímillum ferðafólkini. Tað vísti seg, at teir høvdu gingið á sama flogskiparaskúla í USA sum menninir, ið rændu flogførini 11. september í 2001. KLM -flogfarið mátti tí aftur til Amsterdam við teimum báðum monnunum, skrivar Washington Post.